DAGSINS MEINING

Hart at vera føroyingur í Føroyum

Um dagarnar kundi Sosialurin grei›a lesarunum frá, at avger›in at lækka rentustu›ulin stendur vi›. Líkt er til, at ta› er einki, sum fær okkara borgarliga landsst‡ri› til umhugsa hesa ætlan. Or›ini hjá Fólkaflokkinum, "at peningurin liggur best í lummanum hjá tí einstaka borgaranum", ver›a aftur gjørd til skammar.Hetta hendir samstundis sum oljan er hækka› til himmalskar hæddir. Samstundis sum renturnar í bankum og sparikassunum aftur krúpa uppeftir. Og samstundis sum prísurin á flest øllum matvørum og n‡tsluvørum tykist at hækka stø›ugt.

Avlei›ingin av hesum er, at tann vanligi føroyingurin fær ikki endarnar at røkka saman. Hó, hó, rópar Fólkaflokkurin óiva›. "Tit mugu ikki gloyma, at vit, langt um leingi, hava drigi› handa ómøguliga Karsten Hansen og Tjó›veldi› til at lækka skattin frá 1. januar, heilar 81 milliónir krónur". Harafturat kemur alt ta›, sum borgarin kann draga frá í skatti, tá tann n‡ggja (ósolidariska) eftirlønin fer at virka einafer› næsta ár!!! Sum lesarin kanska skilur, so er ta› tann borgarligi Fólkaflokkurin, sum í hvussu er letst at hugsa um "meiniga mannin" og sigur seg vilja geva honum betur rásarúm.

Øvugt tykist vera vi› Tjó›veldisflokinum, sum á pappírinum skuldi veri› ein sosialdemokratiskur flokkur, og sum á›ur var› sagdur at vera ein verkamannaflokkur! Hesi or› eru ikki skriva› í skemti. Heldur ikki eru tey ætla› at vera speirekandi, men stø›an er bara so tragikomisk. Og álvarsom. Spurningurin er, hvussu leingi vanligi føroyingurin finnur seg í at ver›a knokkroyttur í skatti, hækkandi rentu, lækkandi rentustu›ulin, samstundis sum landsst‡ri› ikki vil lækka oljuavgjald ella meirvir›isgjald.

"Ta› er hart at vera speidari í Havn", plagdu fólk at taka skemtiliga til, tá okkurt serligt var á vási. Nú kann hugtaki› vi› gó›ari samvitsku broytast til: "ta› er hart at vera føroyingur í Føroyum!" Og leggjast kann afturat, at ta› er einki, sum bendir á, at ta› ver›ur lættari at búgva í Føroyum so leingi sum hetta borgarliga landsst‡ri› situr vi› valdi›!

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Gullbrúdleyp

Í dag eru li›in 50 ár sí›ani Marita og Hanus Pállson gingu saman í hjúnarlag. Tey vór›u vígd í Gøtu kirkju.

Eitt rimmar brú›leyp. Út á náttina brast hann á vi› nor›anstormi, ‡landi hvirlur og blikalogn, so at siga hond í hond. Búgvi› bor›, yrkt var› um drunnin »Eg havi gingi› í gó›um haga...«, føroyskur dansur »Lunnar brustu og jør›in skalv«. Eitt kærleikans og lívsins drama.

Hóast Hanus er føddur og uppvaksin á Vi›arei›i, og tey bæ›i hava bú› ta› mesta av tí›ini hesi farnu 50 ár í Havn, so hava tey djúpar røtur í Nor›agøtu: Marita fødd og uppvaksin í Frammistovu og hennara verfa›ir - lærari í Gásadali, á Vi›arei›i og í Gøtu - Uppi í Jákupsstovu ella Køkinum í Nor›agøtu.

Bæ›i komu tey til Havnar eftir krígslok: hann í timburlæru hjá Herlufi Johansen og hon í starv á Hotel Føroyum ni›ri á Kongabrúnni. Marita var á hotellinum, tá i› ta› eina náttina í 1950 brann í grund. Sum tann álitisma›ur hann er, var Hanus arbei›sforma›ur hjá Phil & Søn í meira enn 25 ár.

Marita og Hanus eru fryntlig og fyrimyndarlig á so mangan hátt. Tey hava veri› og eru arbei›ssom, tey ganga dagliga túrar uttan mun til ve›ri›, duga væl at kvø›a og teljast millum tey, sum vi› lív og sál eru í Dansifelagnum. Hetta og a›rir gó›ir eginleikar, eitt nú livandi at grei›a frá hendingum og persónum aftur í tí›ina, er stø›i› undir teirra vælhildna heimi í Grønulí› 2, har børn og svigarbørn og barnabørn og vinir og kenningar trívast væl í skemti og álvara. Har er høgt til lofti› og vítt til veggja. Ta› fer dagurin í dag óiva› at ver›a fullgott prógv um.

Gullbrú›arparinum ver›ur ynkst hjartaliga tillukku á teirra stóra deg og alt ta› besta í tí›ini fyri framman vi› vøkrum vesturskini.

Gullbrúdleyp

Í dag hava hjúnini Hilda og Daniel Peter Næs, vanliga nevndur Allin, í Nesi í Hvalba, gullbrúdleyp.

Hilda er fødd Ludvig tann 9. mars 1925, dóttir Onnu Katrinu og Jacob Ludvig í Nesi í Hvalba

Allin var› føddur 11. Juli í 1925, hann var sonur Julionnu og Martin Næs í Nesi í Hvalba

Ungur fór Allin til skips, fyrst vi› Westward Ho, men annars hevur hann veri› vi› trolarunum Rádna, Fiskanes Drátti og Leivi Øssurson.

Inn ímillum ró›i hann út, m. a. vi› motorbátinum Johonnu. Men í 1957 kom hann rættiliga illa fyri umbor› á Johonnu. Hann var í fer› vi› at reinsa motorin, íme›an Johanna lá fyri teym, tá i› eldur brádliga kom í og ta› festi í bensin. Allin brendist rættiliga illa og mátti leypa í havi›. Men Ta›, sum lá honum fremst í huganum, var at sløkkja eldin umbor›, so hann kleiv umbor› aftur, og royndi at sløkkja. Aftaná hendan tilbur›in lá hann leingi sjúkur, íme›an brunasárini grøddu.

Í 1963 fór Alllin til Grønlands at arbei›a í Føroyingahavnini og har var hann í nøkur summur. Men um vetrarnar var hann á kolinum.Tey sí›stu árini tókst hann vi› ymisk arbei›i, ró›i út vi› Nor›l‡sinum og Glyvraberg, arbeiddi á flakavirkinum og engdi.

Hilda, hon fór sum so mong onnur í húspláss, tá i› hon var ung, men seinni fór hon til Havnar at seyma hjá beiggja sínum, sum var skræddari.

Hilda og Allin blivu gift 9. desember í 1950 og tey fingu tr‡ børn, Martin er elstur, Anna Katrina er næstelst, tey búgva bæ›i í Hvalba, og Jónger› er yngst, hon b‡r í Havn.

Eftir at Allin og hon vóru gift, og me›an Allin var burturi, passa›i hon hús, gekk til neytar og passa›i sey›. Men tá i› børnini vóru hálvvaksin, fór Hilda at arbei›a fisk í Agnavík.

Fyrst í sjeytiárunum fekk Allin sjúkrakassin í Hvalba at røkja eftir pápa sín. Tá var› kravt inn f‡ra fer›ir um ári›

Uttan eina gó›a konu gongur onki og ta› var skjótt, at Hilda var at síggja í fer› runt bygdina, ofta á eini Puch Maxi.

Tey bæ›i eru enn ógvuliga virkin. Hilda passar enn hús og heim til fulnar, eins og hon altí› hevur gjørt, so hon hevur veri› manninum ein hollur stu›ul.

Og Allin hevur sanniliga eisini gott tilbo› enn. Hóast 75 ára gamal, er hann enn at síggja í Lítlu Dímum, tá i› raksturin er fyri, og hann er enn virkin í dansifelagnum. Á yngri árum var hann eisini av ídnastu og raskastu bakkamonnum.

Gullbrúdleypi› ver›ur hildi› í Roynhøllini í kvøld, har veitsla ver›ur fyri 230 fólkum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-fríi. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ætlanin hjá Bjarna Djurholm skal ste›gast

– Ta›, sum Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum, nú hevur gjørt, er so grovt álop á fakfeløgini, at ta› skal ste›gast.

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum hevur rættiliga lopi› ilt í alla føroysku fakfelagsrørsluna. Og bakkar hann ikki, er stórur vandi fyri, at alt landi› ver›ur lagt lami›. Ta› er uppskoti›, sum hann ætlar at seta í verk, um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast, sum rættiliga fingi› fingi› fakfeløgini at seta føtur í spenni.

Hósdagin hev›i Sjeymannabólkurin hjá fakfeløgunum fund um ætlanina hjá Bjarna Djurholm um at seta lógina um seming í verk.

Og har var ni›urstø›an púra grei›: Uppskoti› skal ste›gast!

Ta› hevur ikki eydnast, at fáa or› á Joan Ziskason, sum er forkvinna á Sjeymannabólkinum, i› umbo›ar allan arbei›smarkna›inum, bæ›i tann privata og tann almenna.

Men Heini Joensen, sum er næstforma›ur í Starvsmannafelagnum, var vi› á fundinum fyri sítt felag.

Hann sigur, at ni›urstø›an á fundinum var, at hetta var eitt so grovt álop á rættindini hjá fakfeløgunum, at ta› skal ste›gast.

Hann vil ikki útgreina, hvussu fakfeløgini ætla at ste›ga ætlanini, um hon ver›ur trumfa› ígjøgnum Løgtingi›.

– Ta› ver›ur vi› teimum vápnum, sum fakfeløgini hava til taks, sigur hann. Stutt.

– Ta›, sum fakfeløgini eru serliga ørg um, er, at eftir n‡ggja lógaruppskotinum, fær semingsma›urin heimild at útseta verkfall í ta› óendaliga. Harafturat er ætlanin at blanda seg uppí lógirnar hjá hvørjum einstøkum fakfelag, so at ta› ver›ur at kalla ómøguligt at fella eitt semingsuppskot.

Bjarni Djurholm hev›i ikki siti› leingi í sessinum, á›renn hann rættiliga loypti ø›i í allan tann føroyska arbei›smarkna›in

Taka ta› ringasta burturúr

Heini Joensen sigur, at seinast sáttmálasamrá›ingarnar vóru, hev›i Fíggjarmálast‡ri› eitt høvu›skrav, sum forpesta›i allar samrá›ingarnar. Og ta› var kravi› um, at ein høvu›savtala skuldi setast í verk.

– Ta› miseydna›ist tá. Men ta›, sum nú hendir er ein roynd at lumpa hetta ni›uryvir okkum ígjøgnum bakdyrnar.

– Heini Joensen sigur, at vit mugu minnast til, at donsku lógirnar um høvu›savtalu, seming og arbei›srætt, eru eftir avtalu ímillum partarnar á arbei›smarkna›inum.

– Ta›, sum Bjarni Djurholm nú ætlar, er, at størsti arbei›sgevarin einvíst skal seta lógina í verk í Føroyum.

– Hann sigur, at ta›, sum Bjarni Djurholm ger, er so grovt, at hann tekur ein part av lógini um høvu›savtalu, seming og arbei›srætt og ætlar at seta ta› í gildi í Føroyum, uttan at samrá›ast vi› partarnar á arbei›smarkna›inum um ta›.

– Men harafturat hevur Bjarni Djurholm tiki› teir ringastu partarnar burturúr donsku lógunum og ætlar at seta teir í gildi í Føroyum.

– Eitt nú eru donsku lógirnar um, hvussu atkvø›ast skal í fakfeløgunum um semingsuppskot, linka›ar.

– Men í uppskotinum hjá Bjarna Djurholm ver›a tær gomlu ásetingarnar brúktar, sum gera ta› at kalla ógjørligt hjá fakfeløgum at fella eitt semingsuppskot.

Manglandi hegni

Heini Joensen sigur, at veruligi trupulleikin á arbei›smarkna›inum er, at Fíggjarmálast‡ri› hevur ikki hegni› til at loysa ósemjur á arbei›smarkna›inum.

– Arbei›sste›gir og verkfall hava ongantí› veri› trupulleikin í Føroyum. Men hesi seinastu árini hava avdúka›, hvussu líti› hegni fíggjarmálast‡ri› hevur til at loysa tær ósemjur, sum stinga seg upp.

– Men ísta›in fyri at loysa tann trupulleikan, skal máli› loysast vi› at smoyggja hesa lógina ni›uryvir høvdi› á fakfeløgunum, sigur Heini Joensen.

Føroyskir svimjarar til NM

Hesi tr‡ løgdu í gjár lei›ina til Svøríkis. Tey skulu luttaka í NJM (nor›urlendska unglingameistaraskapi›) í svimjing. Frá vinstru: Mourits Danberg, Bára Joensen og Jógvan Joensen

Mynd: Álvur Haraldsen

Tríggir føroyskir svimjarar fóru fríggjadagin til Svøríkis, har tey skulu kappast í nor›urlendska unglingameistaraskapinum

SVIMJING
Stefan í Skorini

Tey tr‡ Mourits Danberg, Bára Joensen og Jógvan Joensen løgdu í gjár lei›ina til Svøríkis.

Í døgunum 9.-10. desember ver›ur nor›urlendska unglingameistaraskapi› í b‡num Fredrikstad.

Bára Joensen skal kappast í 50 metur rygg og 50, 100 og 200 metur bringusvimjing.

Mourits Danberg skal kappast í 50, 100, 200 og 400 metur frísvimjing.

Jógvan Joensen skal luttaka í 50, 100 og 200 metur bringusvimjing og 50 metur frí.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í rødini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini.Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.



Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.

299,-

Jógvan Arge